FÖROYA LÖGMAÐUR

Tinganes 15. apríl 2020

Frúgv Vigdís Finnbogadóttir
Fyrrverandi forseti Íslands

Góða Vigdís

Vegna Føroya landsstýri og alt Føroya fólk er tað mær ein heiður at ynskja tær hjartaliga til lukku við níti ára føðingardegnum.

Tað var ein søgulig hending, tá fyrsti kvinnuligi forseti Íslands vitjaði Føroyar í 1987. Vitjanin stendur eftir sum eitt bergtakandi minni. Longu árið eftir fekk táverandi løgmaður Atli P. Dam møguleikan at hitta teg í Íslandi. Hesar vitjanir vóru sannar frændavitjanir millum brøðratjóðir og løgdu lunnar undir fleiri vitjanir, sum hava styrkt sambandið og samstarvið millum Føroyar og Ísland á nógvum økjum.

Tíni hjartamál hava verið javnstøða og tungumál. Heimurin hevur nógv at takka tær fyri, tí á hesum báðum økjum er nógv hent. Við tínum miðvísa arbeiðslagi og tignarliga lyndi ert tú ein sonn fyrimynd fyri mong.

Føroyar hava eisini nógv at takka tær fyri. Tú hevur gjørt eitt ótroyttiligt arbeiði fyri mentan og mál í útnorðri. Tú vart drívmegin aftan fyri verkætlanina um Norðurbryggjuna. Hetta er ein sonn útnorðurperla mitt í høvuðsstaði Danmarkar. Ein mentanarligur vari, sum Føroyar, Grønland, Danmark og Ísland eru sera errin av.

Sum UNESCO *Goodwill sendikvinna* síðan 1998, hevur tað eisini eydnast tær at varpa ljós á smærru tungumálini. Krúnan á verkinum er valabygningurin Veröld – hús Vigdísar – hjá Háskóla Íslands, har fremmand tungumál fáa innivist, eisini føroyska tungumálið. Tað eru vit tær sera takksom fyri.

Í kvøld verður á fyrsta sinni veitt nýggj heiðursløn, sum so tignarliga ber navn títt. Tað vildi verið ynskiligt, at umstøðurnar vóru øðrvísi, so tú vart heiðrað, sum tað sømir seg.

Lat meg enda hesa føðingardagskvøðu við at ynskja tær ein hendingaríkan og minniligan føðingardag.

Vinarlig heilsan

B. Niel

Bárður á Steig Nielsen

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel.: (+298) 351010 · Fax: (+298) 351015 · t-postur: info@tinganes.fo · www.tinganes.fo